## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig – um kvøldið um frostmarkið.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri, og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Hann veksur vindin sum frálíður upp í hvassan vind av útsynningi, men yvirhøvur turt. Hitin millum 5 og 9 stig.

Miðlahúsið hóskvøldið:

# Tórshavnar Manskór við Bohemian Rhapsody



*Tórshavnar Manskór verður at hoyra í Miðlahúsinum í Vágsbotni í annaðkvøld, hóskvøldið, kl. 19.30*

**Tórshavnar Manskór verður nú aftur at hoyra. Hesaferð í Miðlahúsinum í Vágsbotni, hóskvøldið 26. januar kl. 19.30. Tá fara teir umleið 35 sangararnir fyrstu ferð nakrantíð at framføra kenda lagið „Bohemian Rhapsody" eftir heimskenda tónleikabólkin Qeen**

TÓNLEIKATILTAK
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir eina røð av konsertum í Føroyum og í Íslandi fer Tórshavnar Manskór nú at syngja í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Og tað verður entá við eini heldur óvanligari skrá. Millum løgini er eisini kendi sangurin hjá bólkinum Qeen, „BOHEMIAN RHAPSODY", sum er útsettur/arrangeraður fyri manskór. Hetta verður fyrstu ferð, at Tórshavnar Manskór fer at framføra hetta lagið alment. Annars verður skráin fjølbroytt og áhugaverd.

Bjarni Restorff, kórleiðari sigur, at teir fara at framføra nakað av tí, sum teir sungu á konsertferðini í Ísland í oktober. Tá vóru teir ymsa staðni í Íslandi, og endaði tann konsertferðin við eini stórari felags konsert fyri symfoniorkestur við meira enn 800 tónleikarum og sangarum úr 22 íslendskum manskórum og teirra millum eisini Tórshavnar Manskóri. Sjálvur íslendski forsetin var við til hetta stóra tónleikatiltak í Reykjavík.

Á konsertini í Miðlahúsinum í annaðkvøld fer Árni Hansen at spæla klaver og Herluf Lützen guittar. Solistar eru Andreas Reinert, Fróði Sandoy og Petur Niclasen. Kórið telur umleið 35 mans.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -7 |
| Nuuk | -10 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 3 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | -9 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -15 |
| Kiev | -11 |
| Bukarest | -9 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 6 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 1 |
| Malta | 10 |
| Tunis | 7 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | -- |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1034 hPa. yvir Føroyum fer spakuliga í landsynning og gevur framvegis góðveður á okkara leiðum.




**Í dag:**
Hátrýstið í landsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/1 kl. $06^{00}$– 25/1. $06^{00}$. Hitin í gjár: 2,2°
Minsti hiti máldur í jan.: -8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/1 kl. $06^{00}$– 25/1 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í januar: 146,1 mm


GEVIÐ BLÓÐ

## VESTFALLSKYRRINDI

17. januar Mánin longst frá jørðini
22. januar Seinna kvarter
29. januar Tendring
30. januar Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Jan. | 02.29 | 14.54 | 01.29 | 13.54 | 01.44 | 14.09 | 04.29 | 16.54 | 05.29 | 17.54 | 00.44 | 13.09 |
| 26. Jan. | 03.23 | 15.52 | 02.23 | 14.52 | 02.38 | 15.07 | 05.23 | 17.52 | 06.23 | 18.52 | 01.38 | 14.07 |
| 27. Jan. | 04.09 | 16.34 | 03.09 | 15.34 | 03.24 | 15.49 | 06.09 | 18.34 | 07.09 | 19.34 | 02.24 | 14.49 |
| 28. Jan. | 05.17 | 17.46 | 04.17 | 16.46 | 04.32 | 17.01 | 07.17 | 19.46 | 08.17 | 20.46 | 03.32 | 16.01 |
| 29. Jan. | 06.14 | 18.42 | 05.14 | 17.42 | 05.29 | 17.57 | 08.14 | 20.42 | 09.14 | 21.42 | 04.29 | 16.57 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Jan. | - | 12.09 | 02.44 | 15.09 | 03.44 | 16.09 | 02.14 | 14.39 | 03.29 | 15.54 |
| 26. Jan. | 00.38 | 13.07 | 03.38 | 16.07 | 04.38 | 17.07 | 03.08 | 15.37 | 04.23 | 16.52 |
| 27. Jan. | 01.24 | 13.49 | 04.24 | 16.49 | 05.24 | 17.49 | 03.54 | 16.19 | 05.09 | 17.34 |
| 28. Jan. | 02.32 | 15.01 | 05.32 | 18.01 | 06.32 | 19.01 | 05.02 | 17.31 | 06.17 | 18.46 |
| 29. Jan. | 03.29 | 15.57 | 06.29 | 18.57 | 07.29 | 19.57 | 05.59 | 18.27 | 07.14 | 19.42 |

Sosialurin

5 707265 100043 >